# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Sofía Jacobsen heiðrað av Føroya Sílaveiðufelag

Á aðalfundi hjá Føroya Sílaveiðufelag mikudagin 30. mars varð 80 ára gamla Sofía Jacobsen í Havn heiðrað við blómum og heiðursprógvi.

Siðvenja er, at tá virknir limir í Føroya Sílaveiðufelag hava fylt 80 ár, verða teir heiðraðir av felgnum og fáa frían limaskap og frítt at fiska hjá felagnum.

"Vit í felagnum, sum nýta møguleikan at fiska við Leynavatn, gleða okkum til aftur í summar at fiska saman við Sofíu, og síggja hvussu hon gleðist í hesum frítíðarítrivi. Vit ynskja henni nógv góð ár afturat við tráuni og alt tað besta í framtíðini", sigur Johan Svensson, formaður í Føroya Sílaveiðufelag.



*80 ára gamla Sofía Jacobsen fekk blómur og heiðursprógv handað av Johan Svensson, sum formanni í Føroya Sílaveiðufelag*

*Mynd: Andrias Joensen*

almannastovan

**Móttøka**

**fríggjadagin 1. apríl 2005 kl. 15-17**

Í sambandi við at tað 1. apríl 2005 eru liðin 30 ár, síðani Almannastovan varð stovnað og í sambandi við at nakrar av deildum Almannastovunar eru fluttar í nýggj høli, verður almenn móttøka á Smyrilsvegi 20 í Havn fríggjadagin 1. apríl 2005 frá kl. 15 til kl. 17.

almannastovan

## Tøkk

Øllum, sum vitjaðu meg og á annan hátt góvu mær gætur á mínum 80 ára føðingardegi, takki eg hjartaliga.

Takk fyri hugnaliga løtu í mínum heimi og fyri gávur og telegrammir og góðynskir.

Av sonnum: Mjúkligt lot í setandi sól.

**Vinarliga**
**Heri Mohr**

# John Rasmussen á Strondum 70 ár



Mánadagin 4. apríl verður John Rasmussen á Strondum 70 ár. John er sonur Davinu, ættað niðri við Rætt á Toftum og Andrias Fredrik Rasmussen (Dia) úti á Ytru Trøð á Strondum. Dia var skipari og sigldi m.a. við Gunnhild undir krígnum. Eisini var hann bátasmiður, og hevði hann bátastøðina á Strondum í nógv ár.

John er elstur av 5 systkjum. Hann og yngsti beiggin Jeffrei eru teir einastu av systkjunum, sum enn búgva á Strondum. Kamma og Sámal eru búsitandi í Íslandi, og Símun býr í Danmark.

Pápi møtti mammu, ið er dóttir Fridu og Anton Bernhard (Benni) Hansen Norðragøtu, í Tórshavn, meðan hann lærdi. Tey blivu vígd í Sjóvar kirkju tann 30. mai 1955, og búðsettust á Strondum. So tann 30. mai í ár verður gullbrúdleyp, har tey bæði Margit og John ætla at hátíðarhalda dagin, tann 28. mai í bygdarhúsinum á Strondum. Tey fingu 4 børn, Anton, Andras, Jónfríð og Marjun, sum vuksu upp í einum tryggum og góðum heimi. Í 1988 vórðu tey úti fyri stórari sorg, tá ið elsti beiggi okkara Anton, so brádliga var tikin frá okkum.

14 ára gamal fór pápi okkara í læru sum elektrikkari hjá Asbjørn Skarðhamar í Tórshavn, og her varð hann útlærdur í 1954. Eftir hetta arbeiddi hann í Heiðunum sum sveinur í 2 ár við húsaisolatión. Í februar1957 tók hann prógv sum installatørur á Sønderborg Installatørskúla. Heimafturkomin arbeiddi hann aftur í Heiðunum, til hann fór til skips. Skip, ið hann hevur siglt við kunnu nevnast, "Tinganes", "Lambanes", og í Íslandi við "Myggur" úr Vestmannaoyggjunum. Áðrenn byrjað var sum sjálvstøðugur vinnurekandi, var hann eitt tíðarskeið á Skála Skipasmiðju.

Í oktober 1965 byrjaði hann at arbeiða sjálvstøðugt, og hevur hann ígjøgnum tíðina havt fleiri lærlingar. Tá hann hevði mest arbeiði, vóru 18 mans í arbeiði. So tann 1. oktober í ár kann hann hátíðarhalda 40 áradagin við egnum virki.

Góði pápi. Vit vilja ynskja tær hjartaliga tillukku við degnum. Takk fyri alt tú hevur verið og er fyri okkum. Vónandi fáa vit nógv góð ár afturat saman.

Heilsan

**Andras, Jónfríð og Marjun við familju**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymsan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá ið

**Janus Johansen**
**í Skúlanum, Kollafirði**

andaðist og varð jarðaður.

*Familjunnar vegna*
**Begga, Osvald, Finbogi, Hervør og Trygvi**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá góði maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Eliesar Magnussen**
**Vágur**

andaðist og varð jarðaður.

Takk fyri blómur, kransar og gávur til sambýlið í Vági. Eisini ein takk til tykkum, ið fylgdu honum til hvíldar.

*Familjunnar vegna*
**Mia**